## AB tapti í Herfølge

AB var á vitjan hjá gamla felagnum hjá Jákupi Mikkelsen, Herfølge í gjár, og fóru akademikarnir aftur til Gladsaxe við einum 2-0 tapi. Aftaná fyrstu 45 minuttirnar var støðan javnleikur 0-0. Tá 70 minuttir vóru spældir legði Roberto Saraiva Herfølge á odda 1-0. 2 minuttir áðrenn leikslok staðfesti Henrik Toft sigurin hjá Herfølge. Tá eitt korter var eftir kom Christian Høgni Jacobsen á vøllin. Christian Høgni hevði ein stóran møguleika at minka um munin í yvirtíðini, men tað hepnaðist tíverri ikki. Heimasíðan hjá AB heldur, at talan var um ein vánaligan dyst hjá AB. AB er nú nr. 5 í næstbestu donsku fótbóltsdeildini, teir hava 19 stig.



## Tottenham-spælarar eru svangir

Venjarin hjá enska felagnum Tottemham, Juande Ramos, hevur sera strangan kostpolitikk,og við einum serfrøðingi á odda hava allir spælararnir hjá Tottenham fingið kostplan um, hvat teir kunnu og skulu eta. Spælararnir gremja seg nú um, at teir ganga svangir áðrenn dyst. Fleiri spælarar hava boðað venjarunum frá, at teir kenna seg illa, tí teir fáa ov lítið at eta áðrenn dyst. Kanska tað er orsøkin til, at Tottenham liggur aftast í Premier League eftir 8 dystir.

## Útisetarnir bæði vunnu og taptu

**Hondbóltsharrarnir hjá ÍF Føroyum vunnu aftur um vikuskiftið, meðan kvinnurnar taptu í sínum fyrsta dysti hetta kappingarárið**

HONDBÓLTUR
*Tíðindaskriv*

Fyrsti dysturin hjá damunum hjá ÍF Føroyar var spældur í gjár ímóti Ajax København. Føroyar kom skjótt á odda 2-0, men mistu leiðsluna til 2-3 til Ajax. Eftir hetta gekk spælið gott, og eina løtu var Føroyar á odda vid 5 málum, men tá fyrsti hálvleikur var liðugur var munurin minkaður til 2 mál.

Eftir hálvleiksstegðin gekk byrjaðnin í seinni hálvleiki sera gott, og við bæði góðum kontraáleypum og góðum málmannsspæli øktist munurin til 4-5 móti endanum av hálvleikinum. Ajax fekk tó fóta sær og kom afturíaftur - men tó ikki nokk til, at sigurin var í vanda. Dysturin endaði 23-20 til ÍF Føroyar, sum harvið kom væl fra byrjan.

Friða Næs 8, Guðrun Poulsen 5, Sólvá Dam 4, Guðný Næs 3, Siri Hovsgarð 1, Eyð T. Magnussen 1, Rannvá Magnadóttir 1.

Harrarnir spældu eisini í gjár, men taptu móti FIF í Frederiksberghøllini. Dysturin endadi 26-19 eftir hálvleiksstøðina 10-9 til FIF. Spæli hjá monnunum kom ongantíð upp at koyra, og serliga fyrst í seinna hálvleiki gekk illa, har FIF økti um munin til 8 mál. Móti endanum gekk betur og Føroyar fekk minka um munin, sum tó bleiv til 7 mál.

Ari Rouch 6, Leif Mikkelsen 3, Magnus Poulsen 3, Helgi Justinusen 2, Steingrímur Funding 2, Heini Bendtsen 1, Rói Eysturdal 1, Petur Óli Samuelsen 1.

# Hildu seg hava vunnið

**Seinasti dysturin hjá føroysku kvinnunum í fýralanda kappingini í Sheffield var leiktur leygarkvøldi móti vertunum úr Stóra Bretlandi. Stórur dramatikkur var í dystinum og ikki minst aftaná dystin**

HONDBÓLTUR
*Ólavur Guttesen*
*ollisweet@hotmail.com*

Føroysku kvinnurnar vóru fullar í sjálvsáliti áðrenn dystin í Stóra Bretlandi, og tað sást týðiliga frá byrjan.

Føroyar løgdu seg á odda 1-0, og komu frammum 4-2, øll málini skorað av Simonu Petersen. Men eftir dreymabyrjanuna hesa løtuna tóktust kvinnurnar at missa tað góða stevið.

Ongland svaraði aftur og kom frammum 4-8, áðrenn Føroyar kom fyri seg aftur seinastu 10 minuttirnar í fyrra hálvleiki.

Í 20. minutti bjargaði Fríða Petersen eitt brotskast, og í 21. minutti fekk Stóra Bretland eina leikara útvístan. Hesar báðar hendingarnar góðu føroyingunum vind í seglini, serliga tá generalurin í verjuni og í álopinum hendan dystin, Guðrið Mortensen, skoraði uppá brotskast. Støðan var nú 5-8, men vindurin vildi ikki leggja seg ikki.

Føroyinganir stríddu seg uppá 8-8, tá Guðrið skoraði enn eitt brotskast, áðrenn liðini fóru til hálvleiks.

### Føroyar tað betra liðið

Í seinna hálvleiki vístu føroysku kvinnurnar øgiligan stríðsvilja. Hóast Stóra Bretland legði seg frammum bæði 8-9, 9-10 og 10-11, svaraðu okkara kvinnur aftur, og hildu á at stríðast.

Tá Føroyar kom á odda 12-11, tóktust tær at hava kontroll á dystinum og høvdu eisini leiktligan yvirvág, hóast tað leikaði sera javnt á.

Tá fýra minuttir vóru eftir, og støðan var 16-14 til Føroyar, tók danski venjarin hjá Stóra Bretlandi eitt time-out, men stríðsviljin og góða verjuspæli hjá føroyingunum hesa løtu, var ikki til at koppa.

Bretar fingu tó eitt mál, men tað hjálpti lítið, tí Føroyar vunnu dystin 16-15. Tískil fingu Føroyar hevnd fyri tapið móti Stóra Bretlandi fyrr í ár.

### Vinnarin avgjørdur á borðinm

Fagnaðurin var sum vera mann stórur á føroysku kvinnunum beint aftaná dystin, men okkurt rungaði ikki rætt, tá Stóra Bretland varð lýst til at vinna kappingina.



Ensk atsókn móti føroyska málinum

Mynd: www.britishhandball.com



Føroysku kvinnurnar stríddust framúr væl í verjupartinum, har vertirnir sjáldan sluppu framat til nakað sum helst

Mynd: www.britishhandball.com

Útisendin hjá Miðlahúsinum hevði longu boðað Miðlahúsinum frá, at Føroyar hevði vunnið kappingina, áðrenn Stóra Bretland fekk tann heiðurin, og hann setti seg tí í samband við føroysku umboðini á staðnum um málið.

Stóra Bretland og Føroyar høvdu eins málmun, +13, men Letland var eisini á fýra stigum, og tí skuldi innanhýsis úrslitið fyri øll trý londini gerast upp. Her stóð Ongland seg best, tí tær vunnu við ikki færri enn fimm málum móti Letlandi.

Samanlagt gav tað bretunum ein málmun á +4 í innanhýsis uppgerðini. Føroyar høvdu málmunin -1 og Letland hevði -3.

Eitt langt og drúgt kjak fór fram millum føroysku umboðini og dómarapanelið. Stóra Bretland og Føroyar skiftust um at gleðast um, hvat lið hevði vunnið kappingina, meðan fyrireikarnir leitaðu sær ráð úr altjóða hondbóltsreglugerðum, um hvussu farast skuldi fram.

### FAKTA

**Føroysku málskjúttarnir:**
Simona Petersen, 9 mál
Gurið Mortensen, 4 mál
Unn Kragesteen, 2 mál
Ninna K Johansen, 1 mál
Una Olsen, 1 mál